Vesturvón í Norðsjónum

Vestuvón er á veg í Norðsjógvin at royna eftir upsa. Hetta er annar túrurin, hann ger har í heyst

FISKIVINNA
Edvard Joensen

Sørvági: Kvoturnar á vanligu leiðunum hjá flakatrolaranum Vesturvón eru uppi, og tí verður roynt at fara aðrar leiðir.

Vesturvón var herfyri ein stuttan túr í Norðsjónum, har teir royndu eftir upsa av eini felagskvotu, føroyingar eiga har niðri. Eisini Skálaberg var har eitt stutt skifti, men teir rýmdu báðir aftur. Vesturvón kom til Sørvágs, men Skálaberg fór í Barentshavið at fiska tað, teir eiga eftir har eysturi. Vesturvón eigur hinvegin einki eftir í Barentshavinum og kom tí heim, sigur reiðarin, Ólavur Petersen.

Tað var lítið at fáa í Norðsjónum, sigur Ólavur

Vesturvón er á veg í Norðsjógvin at fiska av felags upsakvotu, sum føroyingar eiga har niðri

Petersen. Umframt var eisini eitt sindur ógreitt, hvussu tað var við hjáveiðu, tí talan er um upsakvotu. Hjáveiðuprosentið er ikki nóg væl fyriskrivað, heldur hann, so tað kann vera eitt sindur ivasamt, hvat ein hevur at halda seg til. Sagt verður bert, at hjáveiðan skal vera so lítil sum gjørligt. Tað er mest toskur, sum verður roknaður sm hjáveiða, tó at onnur fiskasløg rímiligt eisini fylgja við, tá trolað verður. Upsin, teir fáa í Norðsjónum, verður skorin til flak umborð, eins og gjørt verður við annan fisk, Vesturvón fiskar.

Hesin túrurin, Vesturvón gjørdi í Norðsjónum, vardi einar tríggjar vikur ella so. Fiskiskapurin var ov lítil, og teir høvdu ikki annað at fara til, so valt varð at fara til hús at bíða nakrar dagar fyri at vita, um tað kann gerast betri seinni.

Ólavur Petersen sigur, at ætlandi fer Vesturvín avstað aftur í dag sum ein annan dag at royna einaferð enn, um tað fer at bera til at fáa eitt sindur burtur úr hasi upsakvotuni, vit eiga í Norðsjónum.

Hvussu so verður hjá teimum um jóltíðir, veit hann enn ikki at siga. Tað velst um fiskiskapin. Men at liggja og draga vaðskít í Norðsjónum á jólum heldur hann ikki vera nakað at bjóða fólki kortini.

Um árið, sum nú er komið væl áleiðis, sigur hann, at hjá Vesturvón hevur tað roynst heilt hampiligt. Alt er fiskað, sum tillutað er, og einki er keypt av fremmandari kvotu. Men tað var tí, at einki fekst, sigur reiðarin. Tað bar ikki til at fáa nakra avtalu við russar um at keypa kvotu frá teimum í ár.

Felagið hjá Vesturvón eigur eisini fýra partrolarar, sum royna undir Føroyum. Akranes og Dragasund, og Vesturleika og Vestursøka.

Hjá teimum hevur fiskiskapurin verið góður í ár, letur Ólavur Petersen at. Men prísirnir hava verið vánaligir alt árið.

West Freezer góðan túr á Bankanum

West Freezer kom um daganrar aftur av Bankanum við 170.000 pundum, sum teir høvdu fingið á tíggju setum. Árið hevur roynst væl, letur reiðarin at

FISKIVINNA
Edvard Joensen

Miðvági: West Freezer kom mánadagin aftur av Bankanum við umleið 170.000 pundum. Meginparturin var toskur. Nakað var eisini av hýsu, longu og havtasku.

Tað hevur gingið rímiliga væl hjá West Freezer í ár, sigur Thomas Jacob á Løgmansbø, reiðari. Teir hava avreitt fyri einar fýra milliónir av trimum bankatúrum, sigur hann. Samanlagt hevur skipið í ár avreitt fyri einar 17 milliónir, letur reiðarin at.

Hendan seinasta bankatúrin høvdu teir 10 setur, sigur reiðarin. Eini 120.000 pund munnu vera toskur, restin er mest hýsa og longa og so kanska eini 5.000 pund av havtasku, væntar hann.

Íslandskvotan er fiskað í ár, og ein bankatúrur ella so er eftir. Farið veerður aftur á Bankan beinaveg, men

West Freezer afturkomin av Bankanum við umleið 170.000 pundum, sum teir fingu á 10 setum
Mynd: Edvard Joensen

tað verður helst seinasti túrurin fyri jól, væntar reiðarin á West Freezer. Annars verður tað vanligur fiskiskapur undir Føroyum, sum stendur fyri.

Tá skipið kom, frystu teir umborð. Men tað gekk einki serligt,og prísurin á frystum fiski lækkaði so munandi, at teir góvust heilt við tí fyri umleið einum ári síðan, sigur Thomas Jacob á Løgmansbø.

Síðan hava teir bara ísað. Tað hevur eisini verið lættari at fingið fólk til styttru ísfiskartúrarnar, enn tað var at fáa fók til teir longu frystitúrarnar, sum vardu upp í einar seks vikur hvør túrurin.

Reiðaríið eigur eisini útróðrarbátin Presttanga, sum er smíðaður úr stáli.

Hjá honum hevur ikki ligið so væl fyri, sigur Thomas Jacob á Løgmansbø, tí hann hevur verið so ófriðaligur.

Stabiliteturin hevur verið keðiligur, og tað hevur gjørt bátin sera óarbeiðsligan. Men nú er hann umbygdur og hevur fingið stabiliseringstanga umborð eisini, so nú man fara at hilnast betri, vænta teir í Miðvági.

Bíblian skal ikki stýra kjakinum

Ein av stigtakarunum til felagið hjá teimum samkyndu, Sonja Jógvansdóttir, heldur, at kjakið um samkynd í Føroyum verður í alt ov stóran mun stýrt av grundgevingum úr bíbliuni ella svørtu bókini, sum hon málber seg.

TABURÁÐSTEVNA
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Kjakið um samkynd í Føroyum hevur fingið nýggj bein at ganga á. Felagið hjá teimum samkyndu í Føroyum, Ælabogin, varð sett á stovn fyri nøkrum vikum síðan, og felagið arbeiðir miðvíst fyri at betra mundi um núverandi í skrift hjá teimum samkyndu í Føroyum.

Kjakið um samkyndar føroyingar hevur higartil verið merkt av at verða ullint og dult. Gamaní hava samkyndir føroyingar, sum búgva í Danmark, verið í Føroyum og sagt sína hugsan um ringu korini, sum samkynd hava í Føroyum, men tað hevur gingið striltið at fáa føroyingar í Føroyum at siga sína hugsan.

Ælabogin ætlar at gera nakað við ta støðuna, og leygardagin fáa tey fyri fyrstu ferð høvi til at greiða frá sínum sjónarmiðum í einum almennum kjaki.

Á tabu-ráðstevnuni hjá politisku ungmannafeløgunum fara presturin, O.K Olofsson, og Sonja Jógvansdóttir fyri Ælabogan at siga sína hugsan um støðuna hjá teimum samkyndu í Føroyum.

Eg haldi ikki, at fjølmiðlarnir í Føroyum eru sína uppgávu vaksnir á økinum, tí teir dyrka altíð tað ekstrema, og tað er ikki rætt, tí tað gevur eina skeiva mynd av veruleikanum, sigur Sonja Jógvansdóttir
Mynd: Jens Kristian Vang

Ein minniluti

Sonja Jógvansdóttir sigur seg vóna, at kjakið leygardagin verður virðiligt og gevandi. Hon fegnast um, at tey samkyndu í Føroyum fáa høvið at siga sína hugsan í einum almennum kjaki.

– Politisku ungmannafeløgini í Føroyum eru nógv meira progressiv og opin, enn flokkarnir sjálvir. Tað er tí nógv lættari at kjakast við ungmannafeløgini, og vónandi kunnu tey ávirka flokkarnar til at virða tey samkyndu í Føroyum, sigur Sonja Jógvansdóttir.

Hon heldur, at kjakið um tey samkyndu verður í alt ov stóran mun stýrt av bibliuni ella svørtu bókini, sum hon kallar hana. Hon heldur ikki, at tað er rætt, at kjakið um samkynd í Føroyum í 2003 verður stýrt í so stóran mun av skriftstøðum í bibliuni.

Sonja Jógvansdóttir vónar, at kjakið á ráðstevnuni leygardagin verður sakligt, og at fólk hyggja eitt sindur longur, enn bara at grundgeva fyri sínum sjónamiðum út frá bibliuni

– Í Føroyum er tað ein lítil minniluti, sum stýrir øllum kjakinum um tey samkyndu. Fjølmiðlarnir hava í hesum sambandi eina stóra ábyrgd. Eg haldi ikki, at fjølmiðlarnir í Føroyum eru sína uppgávu vaksnir á økinum, tí teir dyrka altíð tað ekstrema, og tað er ikki rætt, tí tað gevur eina skeiva mynd av veruleikanum. Tað hevði verið rættiliga áhugavert at sæð, hvussu stóra rúmd hesin minnilutin í føroyska samfelagnum fær í føroysku fjølmiðlunum, sigur Sonja Jógvansdóttir.

Góða móttøku

Tað eru góðar tvær vikur, síðan Ælabogin varð settur á stovn. Fleiri og fleiri limir leggjast afturat felagnum, og talið er nú millum 25-30 skrásettir limir. Sonja sigur, at Ælabogin hevur fingið góða móttøku, og stóra limatalið vísir, at tørvur er fyri einum felagi fyri samkynd í Føroyum.

– Endamálið við felagnum er, at vit kunnu standa saman og verða hoyrd í føroyska samfelagnum. Skulu vit fáa politikkararnar at gera nakað við málið, er neyðugt, at vit hava eitt felag, sum kann argumentera við sjónarmiðjunum hjá teimum samkyndu. Felagið er eisini eitt slag av hjálparfelagsskapi hjá teimum samkyndu, har tey kunnu kenna seg trygg, greiðir Sonja Jógvansdóttir frá.

Skrá

10.00 Kaffi og vælkomin. Orðstýrarin hevur orðið.

10.15 Rúsdrekka
Dagmar Joensen og Bill Justinussen hava hvør sínar 10 min. at leggja fram

Kjak

12.00 Døgurði (Pizza 67)

13.00 Fyribyrging
Umboð frá ProVita og Bergtóra Hanusardóttir frá Kvinnufelagnum fáa hvør sínar 10. min at lýsa síni sjónarmið

Kjak

14.15 Kaffi og roykisteðgur

14.30 Porno
Jógvan á Høvdanum, yngri og Elin Reinert Planck, leiðari av Kvinnuhúsinum fáa hvør sínar 10 min.

Kjak

15.45 Kaffi og roykisteðgur

16.00 Homoseksualitetur
O.K. Olofson og Sonja Jógvansdóttir fáa hvør sínar 10 min.

Kjak

17.15 Ráðstevnan endar.

Vilja nema við tað friðhalgaða

Politisku ungmannafeløgini vilja hava eitt virðiligt kjak um tabu evnini í føroyska samfelagnum. Leygardagin skipa tey fyri ráðstevnu um rúsdrekka, porno, fosturtøku og homoseksualitet á Læraraskúlanum

TABURÁÐSTEVNA
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Politisku ungmannafeløgini í Føroyum eru við at ótolnast. Ungmannafeløgini eru á einum máli um, at mál sum fosturtøka, rúsdrekka, samkynd og porno í Føroyum hevur uppiborið eitt virðiligari kjak, og tí gera tey nakað við málið. Leygardagin skipa politisku ungmannafeløgini fyri eini rættiligari áhugaverdari og forvitnisligari ráðstevnu í Læraraskúlahøllini. Undir heitinum, Tabu-ráðstevnan, verður alment kjak um rúsdrekka, fosturtøka, homoseksualitet og porno í Føroyum.

Øll evnini eru sokallað friðhalgað evni í føroyska samfelagnum, og politisku ungmannafeløgini meta, at stórur tørvur er á einum kjaki um hesi evni.

– Tað er væl lættari hjá ungmannafeløgunum at kjakast um hesi evni enn flokkarnir í løgtinginum, tí teir eru bundnir av samgonguskjali og veljarunum, og tí er torført at fáa gongd á kjakið um tabu evnini. Føroyar eru eftirbátur á hesum økjum, og vit vóna tí at birta í eitt kjak, sum eisini kann halda fram eftir ráðstevnuna, greiðir Ragnhild Olsen.

Øll sjónarmið við

Fleiri áhugaverd fólk fara at hava innlegg um tey ymisku tabu evnini í Føroyum. Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Bill Justinussen, og stjórin á Rúsdrekkasølu Landsins, Dagmar Joensen, leggja fyri við at siga sína hugsan um rúsdrekkalóggávuna.

Annað evnið verður fosturtøka, har umboð fyri ProVita og kvinnufelagnum í Havn siga frá sínum sjónarmiðjum. Porno verður triðja evnið. Jógvan á Høvdanum, ið gevur blaðið Ð út og Elin Reinert Planck, leiðari á Kvinnuhúsinum, fara at røða um porno. Seinasta evnið verður homoseksualitetur, og innleggini eiga O.K Olofson, prestur, og Sonja Jógvansdóttir, limur í Ælaboganum.

Stigtakararnir siga, at tað hevur verið lætt at fáa tey ymisku fólk at greiða frá sínum sjónarmiðjum um tabu evnini. Ungmannafeløgini hava lagt seg eftir at fáa fólk, sum kunnu verða við til at lýsa evnini frá báðum síðum. Fólkini, ið eru vald, verða mett til at kunna at fáa eitt virðiligt orðaskifti í gongd um evnini, har møguleiki verður fyri at hoyra øll sjónarmið á økjunum.

Fyrireikararnir siga seg vóna, at fólk møta fjølment upp, so kjakið verður so lívligt sum gjørligt. Sagt verður frá, at ráðstevnan byrjar klokkan 10 leygarmorgunin í Læraraskúlahøllini.